NORĐOYA SPARIKASSI

HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2010 HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2010 HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2010

NORÐOYA SPARIKASSI

Høvuðsdeildin:
Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. +298 475000
Fax +298 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Saltangará:
Heiðavegur 21
FO-600 Saltangará
Tel. +298 475000
Fax +298 476012

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 475000
Fax +298 476015

HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2010 **HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2010** HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2010

# UM SPARIKASSAN

Sparikassin

er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peningaogn ella avlopi sparikassans.

Avlop sparikassans

verður - burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

Í sparikassanum

eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

# INNIHALDSYVIRLIT


| | |
|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | 6 |
| LEIÐSLUFRÁGREIÐING | 7 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR | 9 |
| FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI | 10 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI | 11 |
| LYKLA- OG HØVUÐSTØL | 12 |
| NOTUR | 13 |

# LEIÐSLUÁTEKNING

Vit hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrásøgnina fyri 1. hálvár 2010 fyri Norðoya Sparikassa.

Hálvársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarstøðu pr. 30. juni og úrslitinum fyri 1. hálvár 2010.

Somuleiðis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rætta frágreiðing um gongdina í virksemi og fíggjarligu støðu sparikassans, umframt eina frágreiðing av teimum mest týdningarmiklu váðum og óvissum, ið sparikassin kann verða ávirkaður av.

Klaksvík, 26. august 2010

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| John P. Danielsen<br>formaður | Jóannes Hansen<br>*næstformaður* | Jóhanna á Tjaldrafløtti |
| Kristian Martin Rasmussen | Erling Petersen | Finn Kjølbro |
| Julianna Thomsen | Eyðun Nolsøe | Guðrið L. Olsen |



# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Norðoya Sparikassi hevði 1. hálvár 2010 eitt hall áðrenn skatt uppá 9,8 mió.kr. ímóti einum halli uppá 12,9 mió.kr. áðrenn skatt 1. hálvár 2009.

Niðurskrivinganar eru ein týðandi orsøk til úrslitið. Sparikassin hevur í 1. hálvár 2010 framt niðurskrivingar av útlánum og áogn uppá 12,9 mió.kr. Aðrar orsøkir til hallið eru millum annað fráfaringarløn til stjórn uppá 2,5 mió.kr. og óvanligar útreiðslur uppá 6,5 mió.kr. í samband við umlegging og útskifting av kt-veitara frá Elektron til SDC. Íalt eru óvanligu útreiðslurnar 9 mió.kr.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar vóru 37,3 mió.kr. 1. hálvár 2010 ímóti 32,1 mió.kr. 1. hálvár 2009, ein vøkstur uppá 5,2 mió.kr.

Vøksturin í netto rentu- og kostnaðarinntøkunum stavar serliga frá einum vøkstri í netto rentuinntøkunum uppá 7,4 mió.kr., sum stava frá eini hækking í rentumarginalinum og frá eini broyting av útláni í mun til innlán. Samstundis vísir gongdin í kostnaðarinntøkunum eitt fall uppá 2,1 mió.kr., sum kemst av eini broyttari samanseting av fíggjarligum ábyrgdum og útláni, færri lánimálum og eini hækking í goldnum kostnaðum og provisjónsútreiðslum.

Hækkingin í netto rentu- og kostnaðarinntøkunum er í tráð við tað, sum sparikassin hevði roknað við: at netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar fóru at vera 10 mió.kr. hægri í 2010 enn tær vóru í 2009.

### Virðisjavnan

Virðisjavnan vísir ein vinning uppá 3,2 mió.kr. 1. hálvár 2010 ímóti einum vinningi uppá 0,5 mió.kr. sama tíðarskeið í 2009.

Goymsla sparikassans av lánsbrøvum við endan av 1. hálvári 2010 vísir 0 kr.

### Útreiðslur og avskrivingar

Samlaðu útreiðslur sparikassans, íroknað avskrivingar uppá materiella ogn og útreiðslur til Bankapakka I, vóru í 1. hálvári 2010 38 mió.kr., ímóti 29 mió.kr. 1. hálvár 2009. Hetta svarar til eina hækking uppá 9 mió.kr., sum eisini svarar til óvanligu útreiðslurnar.

### Niðurskrivingar

Niðurskrivingar uppá útlán og aðra áogn vóru 12,9 mió.kr. 1. hálvár 2010 ímóti 17,2 mió.kr. 1. hálvár 2009.

Niðurskrivingarprosentið 1. hálvár 2010 svarar til 0,6% av øllum útlánum og ábyrgdum ultimo 1. hálvár 2010.

Samlaðu niðurskrivingarnar og burturleggingarnar eru ultimo 1. hálvár 2010 íalt 70,2 mió.kr., sum svara til 3,9% av øllum útlánum og ábyrgdum ultimo 1. hálvár 2010, ímóti 3,2% ultimo roknskaparárið 2009 og 2,5% ultimo 1. hálvár 2009.

### Úrslit av kapitalpørtum

Einki virksemi hevur verið í atknýttum feløgum í 2010 og úrslitið er bókað til 0.

## FÍGGJARSTØÐA

Fíggjarstøða sparikassans er vaksin við 491 mió.kr. í 1. hálvári 2010, frá 2.266 mió.kr. til 2.757 mió.kr. svarandi til 21,6%.

Hetta stavar í størsta mun frá, at sparikassin hevur útskrivað lánsbrøv uppá 649 mió.kr. í samband við Bankapakka II. Samstundis eru innlán í 1. hálvári 2010 minkað við 166 mió.kr. frá 1.893 mió.kr. ultimo 2009 til 1.727 mió.kr. ultimo 1. hálvár 2010. Hetta er ein minking uppá 8,8%.

Útlán eru minkað við 57 mió.kr. í 1. hálvári 2010 frá 1.838 mió.kr. ultimo 2009 til 1.781 mió.kr. Tað er ein minking uppá 3,1%.

### Gjaldføri

Sparikassin hevur gott gjaldføri. Yvirdekningurin í mun til lógarkravið er ultimo 2010 257,8%, ímóti einum yvirdekningi ultimo 1. hálvár 2009 uppá 125,2%.

Høvuðsorsøkin til at gjaldførið er hækkað í 1. hálvári 2010 er, at sparikassin hevur útskrivað lánsbrøv fyri 649 mió. kr. sambært Bankapakka II. Bankapakki I fer úr gildi tann 30.09.2010 og hevur sparikassin nú fingið 3 ára individuella statsábyrgd fyri at tryggja støðugt og gott gjaldføri næstu árini.

Útlán áðrenn niðurskrivingar í mun til innlán eru nú 107%. Til dekning av muninum millum innlán og útlán hevur sparikassin eginpening, innlán frá øðrum peningastovnum og trekningsrætt í Danska Tjóðbankanum, hetta fyri at tryggja at gjaldførið lýkur lógarinnar krøv og sparikassans gjaldføristørv.

### Solvensur og eginpeningur

Eginpeningur sparikassans er, eftir at hallið 1. hálvár 2010 er frádrigið, 229,8 mió.kr.

Solvensurin var ultimo 2010 17,4% ímóti 16,3% ultimo 2009.

Sparikassin hevur í 1. hálvári 2010 fyri fyrstu ferð uppgjørt tær vektaðu ognirnar uttan fyri handilsgoymsluna sambært teimum nýggju reglunum í kunngerðini um kapitaldekning.

### Meting um 2010

Við grundarlagi í tillagaðu grundinntøkuni, neyvari útreiðslustýring og fokus á váða, gjaldføri og kapitalviðurskiftum, hevur sparikassin eitt trygt útgangsstøði fyri 2. hálvár 2010.

Sparikassin væntar eitt avlop uppá umleið 10 mió.kr. áðrenn niðurskrivingar í 2. hálvári 2010. Samstundis væntar sparikassin at niðurskrivingarnar vera lægri enn í 1. hálvári 2010. Fyri árið 2010 verður soleiðis roknað við einum halli uppá 10 mió.kr., sum í størsta mun stavar frá óvanligum útreiðslum.

Fyri 2011 roknar sparikassin við einum avlopi á umleið 10-20 mió.kr. áðrenn niðurskrivingar.

### Váðar og váðastýring

Ongar broytingar eru í váða og váðastýring sparikassans. Víst verður tí til frágreiðingina í ársfrágreiðingini fyri 2009.

### Hendingar eftir roknskapartíðarskeiðið

Eftir at roknskapartíðarskeiðið endaði 30.06.2010 eru ikki farnar fram týðandi hendingar, sum hava ávirkan á fíggjarligu gongd sparikassans.

### Óvissur við innrokning og máting

Tær mest týðandi óvissurnar við innrokning og máting eru knýttar at virðisáseting av ognum og niðurskrivingum av útlánum og áogn. Leiðslan metir, at óvissurnar eru á einum støði, sum er nøktandi í mun til hálvársfrásøgnina.

### Nýttur roknskaparháttur

Sparikassin hevur ongar broytingar gjørt í nýttum roknskaparhátti. Víst verður til ársfrásøgnina fyri 2009.



## RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HALVÁR

| Nota | | 2010<br>1.000 DKK | 2009<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 61.906 | 73.808 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 25.865 | 45.167 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **36.041** | **28.641** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 0 | 123 |
| 3 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 1.966 | 3.742 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 714 | 402 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **37.293** | **32.104** |
| 4 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, partabrøvum, gjaldoyra o.ø. | 3.214 | 502 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 489 | 802 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 32.806 | 27.129 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 2.007 | 1.633 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 3.157 | 402 |
| 6 | Avskrivingar og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | 12.874 | 17.165 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 0 | 0 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **-9.848** | **-12.921** |
| | Skattur | -1.773 | -2.167 |
| | **Hálvársúrslit** | **-8.075** | **-10.754** |

# FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI

| Nota | | 2010<br>1.000 DKK | 2009<br>1.000 DKK | Ultimo 2009<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 76.304 | 106.037 | 40.396 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 764.572 | 184.441 | 54.141 |
| | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.780.855 | 1.915.649 | 1.837.592 |
| | Lánsbrøv til dagsvirði | 0 | 99.952 | 203.113 |
| | Partabrøv o.a. | 43.118 | 42.848 | 41.971 |
| | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 987 | 2.461 | 987 |
| | Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 1.085 | 601 | 1.085 |
| | Fastognir íalt | 41.453 | 44.695 | 41.560 |
| | Íløguognir | 19.644 | 22.115 | 19.644 |
| | Aðrar materiellar ognir | 21.809 | 22.580 | 21.916 |
| | Aðrar materiellar ognir | 16.758 | 20.317 | 18.414 |
| | Útsett skattaogn | 17.975 | 10.508 | 16.202 |
| | Yvirtiknar ognir | 11.201 | 5.741 | 9.001 |
| | Aðrar ognir | 1.896 | 20.761 | 1.922 |
| | Tíðaravmarkingar | 595 | 0 | 0 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.756.799** | **2.454.011** | **2.266.384** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | | |
| | **Skuld** | | | |
| | Skuld til peningastovnar | 65.145 | 65.102 | 65.000 |
| | Innlán og onnur skuld | 1.727.583 | 2.082.667 | 1.892.799 |
| | Útgivin lánsbrøv til dagsvirði | 649.415 | 0 | 0 |
| | Onnur skuld | 23.539 | 34.388 | 11.241 |
| | Tíðaravmarkingar | 143 | 0 | 0 |
| | **Skuld tilsamans** | **2.465.825** | **2.182.157** | **1.969.040** |
| | | | | |
| | **Avsetingar** | | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 2.548 | 2.639 | 2.548 |
| | Avsetingar til útsettan skatt | 0 | 747 | 0 |
| 6 | Avsetingar til tap uppá ábyrgdir | 2.994 | 878 | 1.396 |
| | Aðrar avsetingar | 5.801 | 3.329 | 5.535 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **11.343** | **7.593** | **9.479** |
| | | | | |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **49.814** | **0** | **49.814** |
| | | | | |
| | **Eginpeningur** | | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 6.604 | 6.803 | 6.763 |
| | Gávugrunnur | 0 | 1.000 | 0 |
| | Uppskrivingargrunnur | 0 | 0 | 0 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 231.288 | 267.212 | 269.273 |
| | Flutt frá ársúrsliti | -8.075 | -10.754 | -37.985 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **229.817** | **264.261** | **238.051** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.756.799** | **2.454.011** | **2.266.384** |

7 Aðrar skyldur

# ÚTGREINING AV EGINPENINGI

| | 2010<br>1.000 DKK | 2009<br>1.000 DKK | Ultimo 2009<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Kapitalflytingar** | | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 6.763 | 7.066 | 7.066 |
| Til- og frágongd í árinum | -159 | -263 | -303 |
| **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **6.604** | **6.803** | **6.763** |
| | | | |
| Gávugrunnur við ársbyrjan | 0 | 1.000 | 1.000 |
| Flutt til yvirskotsbýti | 0 | 0 | 1.000 |
| Flutt frá býti av ársvinningi | 0 | 0 | 0 |
| **Gávugrunnur við ársenda** | **0** | **1.000** | **0** |
| | | | |
| Aðrir grunnar við nettouppskriving eftir innara virði við ársbyrjan | 0 | 0 | 0 |
| Broyting primo | 0 | 0 | 0 |
| Flutt frá býti av ársvinningi | 0 | 0 | 0 |
| **Aðrir grunnar við nettouppskriving eftir innara virði við ársenda** | **0** | **0** | **0** |
| | | | |
| Uppskrivingargrunnurin við ársbyrjan | 0 | 6.252 | 6.252 |
| Afturførdar uppskrivingar | 0 | 6.252 | 6.252 |
| Uppskrivað í árinum | 0 | 0 | 0 |
| **Uppskrivingargrunnurin við ársenda** | **0** | **0** | **0** |
| | | | |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 231.288 | 274.739 | 274.739 |
| Broyting primo | 0 | -13.779 | -12.718 |
| Flutt frá gávugrunni, netto | 0 | 0 | 1.000 |
| Afturførdar uppskrivingar | 0 | 6.252 | 6.252 |
| Flutt frá ársúrsliti | -8.075 | -10.754 | -37.985 |
| **Flutt avlop við ársenda** | **223.213** | **256.458** | **231.288** |
| | | | |
| **Eginpeningur tilsamans** | **229.817** | **264.261** | **238.051** |

# LYKLA- OG HØVUÐSTØL

| Lyklatøl | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 20,0 | 17,0 | 17,4 | 15,1 | 17,4 |
| Kjarnukapitalprosent | 20,0 | 17,0 | 17,4 | 15,1 | 17,4 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 2,5 | 6,3 | -0,4 | -5,3 | -4,2 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftan á skatt | 2,0 | 5,2 | -0,3 | -4,4 | -3,5 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,38 | 1,79 | 0,97 | 0,72 | 0,81 |
| Rentuváði | 2,5 | 1,1 | 1,3 | 0,5 | 4,8 |
| Gjaldoyrastøða | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,2 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 100,7 | 117,1 | 112,8 | 94,2 | 107,0 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 85,7 | 20,4 | 51,7 | 125,2 | 257,8 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til eginpening | 49,2 | 57,2 | 57,4 | 93,1 | 85,3 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 1,7 | 1,1 | 1,3 | 2,5 | 3,9 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í hálvárinum | 0,1 | 0,0 | 0,3 | 0,9 | 0,6 |
| Hálvársútlánsvøkstur í árinum | 13,2 | 12,4 | 1,1 | 3,1 | -3,1 |
| Útlán í mun til eginpening | 4,4 | 5,2 | 5,5 | 7,4 | 7,7 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 30.407 | 42.569 | 38.556 | 32.104 | 37.293 |
| Virðisjavnan | -4.255 | 3.057 | -5.435 | 502 | 3.214 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 0 | 0 | -499 | 0 | 0 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 217 | 211 | 391 | 802 | 489 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **26.369** | **45.837** | **33.013** | **33.408** | **40.996** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 17.367 | 25.558 | 26.320 | 27.531 | 35.963 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 725 | 1.381 | 1.924 | 1.633 | 2.007 |
| Niðurskrivingar av útláni og skuldarum v.m. | 1.079 | -1.276 | 6.700 | 17.165 | 12.874 |
| **Hálvársúrslit áðrenn skatt** | **7.198** | **20.174** | **-1.931** | **-12.921** | **-9.848** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 1.257.577 | 1.690.575 | 1.837.567 | 1.915.649 | 1.780.855 |
| Virðisbrøv | 236.774 | 149.085 | 251.980 | 142.800 | 43.118 |
| Innlán | 1.271.842 | 1.461.588 | 1.660.994 | 2.082.667 | 1.727.583 |
| Javni | 1.577.574 | 1.966.696 | 2.249.445 | 2.454.011 | 2.756.799 |
| Eginpeningur | 288.989 | 326.794 | 325.489 | 264.261 | 229.817 |

*Samanberingartøl fyri árini 2006 til 2008 eru ikki tillagað broytingum í nýttum roknskaparhátti.*

# NOTUR

| Nota | | 2010<br>1.000 DKK | 2009<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Lánistovnar og tjóðbankar | 287 | 2.779 |
| | Útlán og onnur ogn | 58.566 | 66.658 |
| | Lánsbrøv | 3.053 | 4.371 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **61.906** | **73.808** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Lánistovnar og tjóðbankar | 691 | 582 |
| | Innlán og onnur skuld | 21.470 | 43.958 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot í sambandi við Bankapakka II | 2.715 | 0 |
| | Ábyrgdarpeningur | 100 | 140 |
| | Aðrar rentuútreiðslur | 889 | 487 |
| | **Rentuútreiðlsur tilsamans** | **25.865** | **45.167** |
| 3 | **Kostnaðar- og provisjónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 62 | 42 |
| | Gjaldstænastur | 591 | 1287 |
| | Lánisakskostnaður | 70 | 701 |
| | Provisjón av ábyrgdum | 511 | 1.469 |
| | Aðrir kostnaðir og provisjón | 732 | 243 |
| | **Kostnaðar- og provisjónsinntøkur tilsamans** | **1.966** | **3.742** |
| 4 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | 2.160 | 2.482 |
| | Partabrøv | 1.148 | -1.971 |
| | Gjaldoyra | -94 | -9 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **3.214** | **502** |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | | | |
| | **Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn** | | |
| | Stjórn | 3.486 | 1.183 |
| | Nevnd | 300 | 300 |
| | Umboðsráð | 155 | 68 |
| | **Tilsamans** | **3.941** | **1.551** |
| | Fráfaringarsamsýning á 2,5 mio.kr. er íroknað løn og samsýning til stjórn | | |
| | | | |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | Lønir og samsýningar | 8.652 | 8.821 |
| | Eftirløn | 1.665 | 1.361 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd og avgjøld v.m. | 1.672 | 721 |
| | **Tilsamans** | **11.989** | **10.903** |
| | | | |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 16.876 | 14.675 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **32.806** | **27.129** |
| | | | |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 45,3 | 46,7 |

# NOTUR

| Nota | | 2010<br>1.000 DKK | 2009<br>1.000 DKK | Ultimo 2009<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Niðurskrivingar uppá útlán v.m.** | | | |
| | **Individuellar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar uppá útlán við ársbyrjan | 56.464 | 35.657 | 35.657 |
| | Niðurskrivingar í hálvárinum | 11.721 | 21.744 | 59.169 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -1.002 | -668 | -13.181 |
| | Avskrivingar (endaligt tap) | -3.510 | -14.593 | -25.181 |
| | **Akkumuleraðar individuellar niðurskrivingar tilsamans** | **63.673** | **42.140** | **56.464** |
| | **Bólkaðar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar uppá útlán við ársbyrjan | 2.396 | 5.247 | 5.247 |
| | Niðurskrivingar uppá útlán í hálvárinum | 1.959 | 0 | 1.439 |
| | Afturførdar niðurskrivingar í hálvárinum | -667 | -3.087 | -4.290 |
| | **Akkumuleraðar bólkaðar niðurskrivingar uppá útlán við tilsamans** | **3.688** | **2.160** | **2.396** |
| | Niðurskrivingar eru ikki gjørdar av útistandandi skuld hjá peningastovnum og øðrum skuldarum | | | |
| | **Burturleggingar uppá ábyrgdir** | | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar við ársbyrjan | 1.396 | 17.000 | 17.000 |
| | Burturleggingar uppá ábyrgdir í hálvárinum | 1.598 | 0 | 1.560 |
| | Afturførdar burturleggingar | 0 | -3.122 | -4.164 |
| | Avskrivingar (staðfest tap) | 0 | -13.000 | -13.000 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar tilsamans** | **2.994** | **878** | **1.396** |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **70.355** | **45.178** | **56.256** |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | | |
| | Niðurskrivingar og burturleggingar í hálvárinum | 15.544 | 24.012 | 66.643 |
| | Afturførdar niðurskrivingar og burturleggingar | -1.669 | -6.877 | -21.634 |
| | Renta av niðurskrivaðum parti av lánum | -1.855 | 0 | -2.000 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivaði | 1.007 | 35 | 3.343 |
| | Inngoldið til áður avskrivað krøv | -154 | -5 | -10 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin tilsamans** | **12.874** | **17.165** | **46.341** |
| 7 | **Aðrar skyldur** | | | |
| | **Ábyrgdir** | | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 4.652 | 0 | 0 |
| | Aðrar ábyrgdir | 38.852 | 39.718 | 34.828 |
| | **Ábyrgdir tilsamans** | **43.504** | **39.718** | **34.828** |

HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2010 HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2010 HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2010

www.ns.fo